# TB longt við Kryzstof

TB hevur longt sáttmála við venjaran Krzysztof Popczynski, sum hevur havt ábyrgdina av TB-liðnum síðani í summar, tá ið hann tók yvir í TB, sum hevði sagt tveir venjarar úr starvi frammanundan. Popczynski er ættaður úr Póllandi, og hann hevur vant VB, GÍ og HB. Formaðurin í TB, Jóan Petur Olgarsson, sigur tað vera av alstórum týdningi, at eitt so stórt fótbóltsnavn sum Kryzstof kemur at mynda framtíðina í TB. - Framtíðin er tryggjað, og kemur Kryzstof nú eisini at taka sær av unglingaliðnum frá komandi kappingarári, sigur TB-formaðurin. Eftir úrslitunum í seinnu hálvu av inniverandi kappingarári at døma, metir Jóan Petur Olgarsson at tað skuldi borið til at flutt upp í bestu deildina í næsta ár. Hann kann eisini upplýsa, at hópurin til komandi kappingarár verður so at siga óbroyttur



# Totti ov seinur til dopingroynd

Tað verður mett sum eitt álvarsamt brot, um eitt ítróttarfólk kemur ov seint til eina dopingroynd, men italski stjørnuspælarin Francesco Totti sleppur við skrekkinum, eftir at hann fyrr í ár kom ov seint til eina dopingkanning. Orsøkin til, at Totti kom ov seint var, at hann bleiv pápi sama dag, og hetta halda dopingeftirlitið og italska fótbótlssambandið er ein umbering, sum kann brúkast, og tí verður Totti ikki revsaður.

# Stjørnurnar komu úr luftin

**Eirindarleysu fronsku heimsstjørnurnar við ungum og svongum monnum á odda settu í heystarveðrinum illa uppløgdu føroysku amatørarnar út á berajól**

FØROYAR-FRAKLAND
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Hetta var einki stuttligt. Tað var synd í føroysku spælarunum, og spurningurin er, hvørjum endamáli tað tænir í hesum teigunum at lyfta peikifingurin fyri at siga teimum og øðrum, hvat var skeivt, og hvussu tað kundi havt verið betri.

Franska fótbóltslendingin segðist vera við buldur og brak í Vágum, og tað var ikki við mýkindum, tá ið heimsstjørnurnar komu so at siga úr luftini og á Tórsvøll.

Tapararnir í HM finaluni ímóti nummar nøkur 190 á FIFA styrkislistanum eigur at vera ólíka uppgerð. Tað sigur øll fornuft. Men í fótbólti er tað ikki altíð skilið, sum avgerð úrslitið. Tí verður hvørja ferð vónað, at eisini í fótbólti pinkulítlu Føroyar skulu yvirganga seg sjálvar fleiri ferðir, og at heimsstjørnurnar skulu taka sær eitt sindur av løttum, og at tað harvið kanska skal verða spennandi.

Soleiðis var tað, tá ið Frakland vitjaði fyri trimum árum síðani, soleiðis var tað, tá ið Týskland vitjaði fyri fýra árum síðani, og soleiðis var tað, tá ið Italia 2. juni vitjaði, og alt var á gosi, tá ið Rógvi Jacobsen stutt fyri leiklok minkaði um munin til 2-1 – til Italia, forstås.

Soleiðis var tað ikki leygardagin. Frakland vann 6-0. Tað kunnu tað ivaleyst gravast fleiri alinlangar frágreiðingar fram um. Tað stutta av tí langa er, at tølini boða frá logiska muninum, tá ið heimsstjørnur, sum – hóast meiri enn eitt samdøgur á ferð – eru væl upplagdar og alla tíðina spíla seg út ímóti amatørum í Formuladeildini.

## Paradan

Fraklendingar løgdu seg í handavend á odda 2-0. Báðu ferðirnar og eisini, tá ið tvey av málunum í 2. hálvleiki vórðu skorað, var uppspælið í vinstru. Anelka tóktist rangstaddur, tá ið hann setti hol á, og Henry var í sínum eyðkenda stjørnustíli, tá ið hann potaði bóltin niður í málhornið aftanfyri Jákup Mikkelsen, sum hevði nakrar fáar bjargingar, og sum ikki hevði møguleika at gera annað enn at hyggja at, tá ið kúlurnar úr stjørnukanónunum flugu um oyrini á honum og í málið.

2-0 og so hevði ballið ivaleyst verið buðið, um tað eitt nú vóru italiumenn, ið høvdu verið á so langari ferð. Men – tíverri fyri Føroyar og føroyingar – var tað ikki soleiðis hjá fraklendingum hesa ferð.

Skaddi og proppmetti Vieira hevði ivaleyst tikið guvuna av maskinuni, um hann leygardagin hevði verið snaringspunktið í Gundadali. Tað var hann ikki.

Chelsea stjørnan Claude Makelele var bókstaviliga gongustjørna, og tað var Lyon stjørnan Jérémy Toulalan eisini. Tjóðrið í teimum á væl trimmaða vøllinum var stutt. Men teir fyltu nógv og tóku sær av verjuábyrgdunum.

Framrættaða partinum tóku hinar stjørnurnar sær av. Bacary Sagna úr Arsenal í høgru og Patrice Evra úr Manchester United í vinstru vóru meiri vongspælarar enn síðubakkar, og Jérôme Rothen úr PSG og serliga Franck Ribéry úr Bayern München vóru væl upplagdar stjørnur á miðvøllinum.




## EM-undankappingin, bólkur B

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. Skotland | 10 | 8-0-2 | 20-8 | 24 |
| 2. Italia 10 | 7-2-1 | 17-7 | 23 | |
| 3. Frakland | 10 | 7-1-2 | 21-3 | 22 |
| 4. Ukreina 9 | 4-1-4 | 11-12 | 13 | |
| 5. Litava 9 | 3-1-5 | 7-11 | 10 | |
| 6. Georgia | 10 | 2-1-7 | 14-17 | 7 |
| 7. Føroyar 10 | 0-0-10 | 3-35 | 0 | |

## Dystir eftir at spæla

| | |
|---|---|
| 17/10 | Ukreina-Føroyar |
| 17/10 | Frakland-Litava |
| 17/10 | Georgia-Skotland |
| 17/11 | Litava-Ukreina |
| 17/11 | Skotland-Italia |
| 21/11 | Italia-Føroyar |
| 21/11 | Georgia-Litava |
| 21/11 | Ukreina-Frakland |